# Bjarni og Andreas í finaluni

TÍÐINDASKRIV

Bjarni Bogason og Andreas Arge komu víðari eftir annað undanumfarð í karaoke kappingini í Glitnir seinasta hóskvøld.

Tað var, eins og í fyrsta umfarinum tætt millum luttakararnar, tá avgerðin skuldi takast um hvør hevði vunnið seg í finaluna. Seks fólk sungu framúr og gjørdu sítt til at løtan var góð og ikki minst spennandi. Men tá avtornaði vóru tað Bjarni Bogason og Andreas Arge, ið komu í finaluna.

Nógv fólk var komið saman í Glitni seinasta hóskvøld. Karaoke er veruliga nakað sum samansjóðar og fær gott lag í.

Sostatt hava 4 luttakarar hava vunnið sær pláss í finaluni. Mikkjal Viderø og Allan Davidsen komu víðari frá fyrsta undanumfarið.

Seinasta undanumfarð, áðrenn finaluna verður komandi hóskvøld 23. november. Listin er um at vera fullteknaður, men pláss er fyri 3 luttakarum afturat. Tekning ferð fram hjá Kenneth á 504334 ella hjá Terja á 268889. Kappingin ferð fram á tann hátt at lutttakararnir syngja sangir, sum teir sjálvir velja frá av langa listanum hjár Glitnir. Luttakararnir syngja tveir sangir í tveimum umførðum.

Kristian Davidsen:

# Vil altjóðagera Føroya Tele




**Nýggi stjórin á Føroya Tele eitur Kristian Davidsen. Hann er útbúgvin sivilverkfrøðingur og hevur royndir við altjóða arbeiði innan vinnuna. Hann fer serstakliga at leggja dent á at altjóðagera fyritøkuna við inntøkugevandi virksemi uttanfyri landoddarnar**

FØROYA TELE
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í morgun gjørdist greitt, at Kristian Davidsen verður nýggjur stjóri á Føroya Tele. Hann skal taka við tann 1. desember. Verandi stjórin, Andras Róin segði upp herfyri. Sosialurin setti seg í samband við nýggja stjóran í morgun, eftir at tað gjørdist greitt, at nýggja nevndin hevur valt hann.

- Eg fekk at vita mánakvøldið, at eg skal verða nýggi stjórin á Føroya Tele. Eg ivaðist ikki, tá ið hetta starv stóð mær í boði, sigur Kristian Davidsen.

Kristian ætlar ikki at kollvelta fyritøkuna, nú hann kemur at sita við stýrisvølin.

- Yvirordnað er ætlanin at víðarimenna okkara virksemi á føroyska marknaðinum. Afturat tí skulu vit hava eitt økt fokus á at gera Føroya Tele til eina altjóða fyritøku, sigur Kristian og heldur fram:

- Meira ítøkiliga merkir hetta fleiri sáttmálar við útlendskar fyritøkur og fleiri íløgur uttanlands. Sum heild vilja vit skapa meira virksemi, sum er inntøkuskapandi, uttanfyri landoddarnar, sigur hann.

## Einskiljing

Nógv hevur verið tosað um einskiljing av Føroya Tele. Andras Róin hevur arbeitt miðvíst fram móti einari einskiljing av fyritøkuni. Nýggi stjórin hevur eisini sína meining um einskiljingina, men hetta metir hann vera upp til eigararnar at avgera.

- Mín prinsipiella støða til hetta er, at fyritøkur eiga at vera einskildar. Hetta er eisini galdandi fyri Føroya Tele. Tó skal hetta vera upp til eigararnar at avgera. Eg meti, at uppgávan hjá stjórn og nevnd er allatíðina at menna og vaksa um virði á fyirtøkuni, sigur Kristian.

## Starvsfólkarøkt

Starvsfólkarøkt og at fylgja við tíðarandanum hevur eyðkent Føroya Tele, meðan Andras Róin var stjóri. Hetta fer ikki at broytast, nú Kristian tekur við.

- Føroya Tele er ein modernað fyritøka. Vit vilja eisini reka hana sum eina modernaða fyritøku. Starvsfólkarøkt er sera týdningarmikið. Starvsfólkini er okkara besta aktiv, og vit vilja, at øll skulu trívast á arbeiðsplássinum, so at vit fáa mest møguligt burturúr teimum, sigur Kristian, sum heldur at undanfarna leiðsla hevur gjørt eitt gott arbeiði.

- Eg haldi, at leiðslan hevur gjørt eitt sera gott arbeiði. Persónar eru tó ymiskir, og tað eru leiðarar eisini. Tí skal eg ikki siga, at alt verður tað sama, nú eg verði stjóri. Mín fyrsta uppgáva verður at tosa við nógv fólk í fyritøkuni - kanska serliga leiðararnar. Eg fari helst ikki at siga so øgiliga nógv og heldur ikki at vera so markantur fyrstu tíðina. Síðani skulu vit saman finna útav, hvussu vit best kunnu menna Før-

MÁLARALÆRLINGAR

Vit sóknast eftir tveimum fólkum, ið hava hug at útbúgva seg til bygningsmálara.

**Vit vænta:**
At tú ert arbeiðssom/samur, álítandi og hugagóð/ur til hetta arbeiði.

Skrivlig umsókn ynskist.

Málarameistarin Uni Zachariasen

*Vit eru eitt virki málarafirma og í løtuni arbeiða 12 fólk hjá okkum*

Uni Zachariasen, Djúpagilsvegur 44, FO-188 Hoyvík, tlf. 319299